

*Við verkinum "Frá nót til alnót" skrivar Ole Wich Norðoyatunnilin inn í føroyska listasøgu*

# Við øðrum eygum

**Hendan mánaðin hava fólk høvi at síggja eina aðra síðu av listini hjá Ole Wich. Ikki eitt orð afturat um fobiir – men reyði tráðurin er framvegis ein roynd at síggja/vísa heimin við øðrum eygum. Og fyri fyrstu ferð fær nú eisini Noroyatunnilin pláss í listini**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

"List snýr seg ikki um, hvat listamaðurin sær, men um hvat hann megnar at fáa onnur at síggja", hevur onkur sagt. Ein eitt sindur tugd klisjé kanska, men tað er freistandi at koma í tankar um hana, tá tú hyggur at verkunum, sum nógv umstríddi listamaðurin Ole Wich sýnir fram í Leikalund í Klaksvík í løtuni. Fá listafólk her heima munnu so ítøkiliga hava gjørt tað til sítt eyðkenni at vísa okkum tað væl kenda og vanta á ein hátt, so tað tykist, sum tað er fyrstu ferð vit síggja tað.

Mest gjøgnumførda og eftir mínum tykki eisini mest væleydnaða royndin hjá listamanninum at fáa áskoðaran at "síggja" heldur enn at "hyggja" er myndarøðin "Stæreblind". Tað forvitnisliga við hesum seks grafisku prentunum er, at tað gongur ein løta, áðrenn tú fært teg at trúgva, at hetta veruliga er okkara heimligi stari. Í løtum minnir hann mest um ein stríðshugaðan gamm, á øðrum myndum er umhvarvið mest at líkna við eina hábærsliga ørn. Tú undrast, hyggur einaferð afturat og byrjar at skilja listamannin, tá hann sigur, at so leingi vit bara síggja, tað vit vilja síggja, eru vit syrgiliga starblind

Ole Wich minnir í hesum viðfangi á, at øll okkara fatan av umheiminum er grundað á einfaldan – eitt slag av yvirlivilsisstrategi hjá heilanum, so vit skjótt og lætt kunnu fanga, tað vit síggja. Tí síggja vit sum oftast bert eina einfalda svart/hvíta skuggamynd av einum lítlum fugli, tá vit síggja ein stara. Vit geva okkum ikki far um øll tey smáu frábrigdi í rørslum og flogi, sum vísa, nær hann er glaður, svangur, bangin, hevur hug at para seg ella hvat nú hoyrir einum staralívi til. Tað eru frábrigdi sum hesi, Ole Wich hevur roynt at síggja og avmynda, ein vetur hann gekk og fóðraði stararnar í havanum hjá grannanum, meðan hann tók myndir av teimum. Myndatólið hevur nevniliga tann eginleika fram um okkum menniskju, at tað ikki frammanundan hevur gjørt av, hvussu starin eigur ella plagar at síggja út. Víst kanst tú manipulera við myndatólinum, men í hesi røðini hevur listamaðurin brúkt tað sum eitt slag av triðja eyga, sum sær tað, vit annars ikki síggja.

**Norðoyatunnilin inn í listina**

Meðan "Stærblind" mest er at líkna við eina neyva skráseting av veruleiknum, sum hann sær út, er listarliga tilgongdin í verkinum "Frá nót til alnót" ein heilt onnur. Verkið er gjørt úr ymsum tilfari og sett saman av trimum myndum sum ein kollaga, ið ímyndar Klaksvík fyrr og nú. Fyrsta myndin er dimmlitt, har ein svørt nót er spent út yvir alla myndina. Ovast í vinstra horni er límað ein fliða. Hetta er neyvan av tilvild, um tú hugsar um, at nettupp fliður eru eyðkendar við ongantíð at flyta seg



*"Modern Times": Framtíðin kann kennast sum ein ræðandi reyð klemma, sum kroystir teg um høvdið. Men klemmir kunnu eisini brúkast til so nógv annað ....*